# Rýmdu av prentsmiðjuni og út í bumbuskýlið



– Tað var stuttligt at arbeiða her, tá ið tað vóru fleiri mans, og tú vart ungur og raskur. Tað var lív í, og vit høvdu tað gott saman. Hesi seinnu árini havi eg tó trivist væl við at verið einsamallur her. Eg passi meg sjálvan og havi nóg mikið at gera, sigur Martin Thomsen

Mynd: Jens Kristian Vang

**Kríggið var ikki liðugt, tá ið Martin Thomsen fór í læru sum prentari í Gamla Bókahandli í Havn. 60 ár seinni arbeiðir hann framvegis sum prentari á somu prentsmiðju**

PRENTARI
*Eyðun Klakstein*

Týsdagin eru tað liðin 60 ár, síðani Martin Thomsen fór til at arbeiðis á prentsmiðjuni hjá Gamla Bókahandli í Havn.

Hann var 14 ára gamal, tá ið hann fór úr Gøtu og til Havnar at læra, og hóast tað var eitt sindur tilvildarligt, at hann skuldi gerast prentari, so treivst hann so væl í hesum yrki, at hann helt fram alt lívið – sum prentari á somu prentsmiðju.

– Eg haldi, at eg var heppin við læruplássi, tí hetta hevur verið eitt sera gott arbeiðspláss, sigur 74 ára gamli Martin Thomsen. Síðani 1995 hevur hann verið einsamallur til arbeiðis á Prentsmiðju H.N. Jacobsens Bókahandli, og tað verður tann róligi prentarin úr Gøtu, sum hevur búð meginpartin av lívinum í Havn, ið fer at sløkkja og stongja á prentsmiðjuni.

Umvælingar skulu gerast í bókhandlinum, og Martin Thomsen roknar við, at um ársskiftið verður prentsmiðjan latin aftur.

Tá fer hann heim, og hann ætlar sær ikki at finna annað arbeiðið.

## Krógvaðu seg fyri týskum bumbum

Tað var seint í krígnum, at Martin Thomsen fann sær lærupláss.

– Tá í tíðini var tað vanligt, at 14 ára gamlir dreingir fóru til skips, men tað var kríggj, og tá sluppu vit ikki avstað. Tí ráddi tað um at finna eitt lærupláss á landi, greiðir Martin Thom sen frá.

Hann sá eina lýsing frá Gamla Bókahandli í Havn, royndi eydnuna og fekk læruplássið har.

– Vit vóru tríggir dreingir úr Gøtu, sum fóru um somu tíð til Havnar at læra til prentara. Esmar Jacobsen og Meinard Túvulið fóru eisini í prentaralæru, og seinni kom eisini ein prentsmiðja til Gøtu.

Tíðin var ein onnur enn hon, sum vit hava í dag, tá ið Martin Thomsen fór at læra í Havn. Kriggið var ikki liðugt, og tað kom fyri, at teir noyddust at fara av prentsmiðjuni í skundi.

– Vit høvdu eitt bumbuskýlið uttanfyri prentsmiðjuna, og eg upplivdi tvær ferðir, at vit máttu rýma av prentsmiðjuni og fara í bumbuskýlið. Tað var vorðið friðarligari tá, men tað kom framvegis fyri, at tað var luftalarmur, sigur Martin Thomsen.

## Størsta uppgávan frá landslæknanum

Lærutíðin til prentara var fýra ár, men um talan var um ungar mans, so kundi hon ásetast til fimm ár, og tað gingu fimm ár, áðrenn Martin Thomsen fór niður at taka sveinaprógv. Hann skuldi bara á skeið, men meldaði seg til sveinaroyndina og stóð royndina.

Hann arbeiddi niðri í 9 mánaðir, men kom so heimaftur og fór aftur í bókahandilin at arbeiða. Teir settu og prentaðu mest tíðarrit og bøkur. Bløðini vórðu prentað á øðrum prentsmiðjum í Havn.

– Fyrstu tíðina plagdi eg at seta Kristiligt Ungmannablað. Vit prentaðu eisini Kirkjutíðindi, Ítróttartíðindi, skúlabøkur og annað. Eisini fleiri av bókunum hjá Jákup Dahl vóru prentaðar her, sigur Martin Thomsen.

Størsta verkið, sum hann hevur verið í holt við, var doktararitgerðin hjá landslæknanum, sum var fleiri hundrað síður til støddar. Tað var í fimtiárunum.

## Alt verður gjørt við blýggj

At koma inn á prentsmiðjuna hjá Gamla Bókahandli, er sum at stíga nógv ár aftur í tíðina. Útgerðin á prentsmiðjuni er av tí gamla slagnum. Maskinurnar hjá Heidelberger eru eini 50 ára gamlar, og alt verður framvegis sett við blýggi. Her eru ongar teldur ella onnur nútímans útgerð, sum verður brúkt prentarayrkinum nú á døgunum.

Martin vísir, hvussu teksturin, ið skal prentast á brævbjálvar, brævpappír ella annað, verður gjørdur. Hann leggur kvikliga blíggjbókstavirnar í rætta rað og greiðir frá, at tá hann tók hastigheitsprøvan á skúlanum, skuldi hann klára at leggja 50 reglur upp á 90 minuttir. Tað kláraði hann væl, og hann gjørdist ikki seinni at seta árini aftaná.

– Menninir, sum settu við blýggj allan dagin og hvønn dag, gjørdust rættiliga skjótir, sigur hann.

## Einsamallur eftir

Tá ið Martin Thomsen fór í læru í Gamla Bókahandli, vóru fleiri prentarar til arbeiðis, og tað hava tað verið tey flestu árini síðani. Menn, sum Erling Isholm, Stig Rasmussen, Villy Juul, Oskar Hermansson, Knút Thorsvig og Svenning av Lofti hava arbeitt á prentsmiðjuni, men seinastu 9 árini hevur Martin Thomsen verið einsamallur.

– Eg havi so ongan at klandrast við longur, sigur hann skemtandi.

– Tað var stuttligt at arbeiða her, tá ið tað vóru fleiri mans, og tú vart ungur og raskur. Tað var lív í, og vit høvdu tað gott saman. Hesi seinnu árini havi eg tó trivist væl við at verið einsamallur her. Eg passi meg sjálvan og havi nóg mikið at gera, sigur Martin Thomsen.

Og restina av hesum árinum heldur hann fram við at prenta ymiskar smærri lutir fyri fólk, umsiting og virki. Brævbjálvar, serviettar, brævpappír og annað verður við góðum hegni rent ígjøgnum svørtu Heidelberger-maskinurnar.

Men tíðin er við at fara frá gomlu útgerðini, og tá ið hetta árið er av, er eisini eitt tíðarskeið á Prentsmiðju H.N. Jacobsens Bókahandli farið í søguna.











ítróttur
Nr. 212 • fríggjadagur • 5. oktober 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

SÍF-MB 3-0 (1-0):

# FS Vann á skommini

**Fótbólturin og felags samstarvið í Vágum sigraði, tá SÍF við nærum 100% vissu tryggjaðu sær, at tað eisini næsta ár verður eitt FS Vágar í aðru deild**



*Myrkrið hevði langt síðani lagt seg yvir bygdina, tá SÍF og MB spældu mikukvøldið. Sum so kanska sigandi, tí langt ífrá allar fyrireikingarnar til dystin tóktust tola dagsins ljós*

Mynd: Jens Kr. Vang

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skomm. Stór skomm. Tað mundu vera fyrstu orðini, sum runnu gjøgnum heysin, tá dysturin millum SÍF og MB varð blástur ígongd.

Eitt var, at hetta var ein heldur hugtung løta hjá teimum, sum í nógv ár hava stríðst fyri at fáa eitt sterkt FS Vágar upp at standa. Dysturin var í so máta ein lagnudystur, sum fór at gera av, hvørt einum felagsliði yvir høvur var lív lagað. Undan dystinum hevði SÍF boðað frá, at stóð tað til teir, so verður talan framvegis um eitt FSV komandi kappingarár, men tað verður so uttan MB, sum longu í vár boðaði frá, at teir tóku seg úr samstarvinum, tá hetta kappingarárið var av.

## Ólógligir leikarar

Tað er í sjálvum sær ein erlig støða at hava, og í so máta var talan ikki um nakra skomm. Skommin var heldur, hvussu miðvingar høvdu valt at fyrireika seg til dystin. Hvørt tað var talan um eina roynd at mobilisera tað besta, sum bygdin hevur alt seinnu árini, ella um talan bara var um ein jánkasliga roynd at fáa sandavágsmenn at kæra, fæst helst ongantíð at vita. Men í øllum førum funnust fleiri leikarar á liðnum, sum als ikki høvdu loyvi at vera við.

Í vikuni høvdu feløgini bæði fingið ein lista frá FSF, har tað greitt framgekk, hvørjar leikarar feløgini kundu gera nýtslu av. Eitt nú stóðu hvørki Birgir Jørgensen ella Petur Eirikssson á hesum lista, men kortini vóru teir millum teir ellivu, sum byrjaðu á vøllinum fyri MB. Tað sama vóru Bogi Ellefsen, Trygvi Askham og Árni Hansen, sum annars hava leikt fyri SÍ. Tað ljóðaði, at spæliloyvið hjá hesum seinastu nevndu var latið MB í evstu løtu, men har tala reglurnar hjá FSF sítt greiða mál. Einki leikaraskifti frá 10. august til kappingarárslok, og so var ikki stórt meira at tosa um tað. Og skuldi tað havt hent seg, at spæliloyvini vóru avgreidd, so hevði ein leikari sum Birgir Jørgensen kortini ikki havt loyvi at spælt, tí hann fekk reytt kort í seinasta dystinum í aðru deild í ár.

At alt hetta so varð samantvinna við einum provokerandi innmarchi, har MB-fløggini vórðu borin høgt, gjørdi bara ilt verri. Heldur enn at talan skuldi verða um eina ítróttarliga avgerð um, hvør parturin skuldi halda liðnum í aðru deild, tóktist hetta onkursvegna vera ein manifestatión av, at MB er nakað serligt, og at felagið nokk eisini skal standa seg tey næstu 99 árini.

## Fótbólturin vann

Á vøllinum gjørdist tað tó tíbetur tær ítróttarligu fyritreyitirnar, sum avgjørdu tað mesta. Ætlanin hjá MB við styrkinum var kanska, at teir skuldu vinna dystin, fyri síðani at proklamera at sigurin varð frátikin teimum á skrivaraborðinum, men tann ætlanin helt so ikki.

Við gomlu kempum sum eitt nú Torkil Nielsen, Albert Ari Thomassen, Emil Hentze og øðrum eydnaðist fyri tað mesta SÍF - sum leiktu í FS V troyggjum - at halda tamarhald á dystinum. Tíðliga komu teir á odda, tá John Thomsen fór upp ígjøgnum alla vinstru síðu, fyri við eini blanding av hepni og vilja at fáa trýst bóltin inn um. Og í einum tveimum førum høvdu teir eisini góðan møguleika at økja um leiðsluna, uttan at hetta tó eydnaðist.

Eftir steðgin brendi eitt sindur meira á í so máta. Heimaliðið megnaði als ikki í sama mun at halda bóltinum koyrandi. Fyri tað nógva varð heldur sparkað burtur í vónini um, at tað skuldi eydnast Tór-Ingari Akselsen at renna bóltarnar upp, men hann varð væl ansaður av gestunum.

Hinvegin var um reppið, at Birgir Jørgensen skoraði, tá hann gjørdist einsamallur við málverjanum, men úr hálvspískum smekkaði hann til fram við málinum, og løtu seinni varð alt avgjørt. Fyrst endaði ein langur solotúrur hjá Tór-Ingari við, at Rúni Olsen fekk bóltin í høgra borði. Hann var ísakaldur, tá hann fyrst rundaði ein verjuleikara, áðrenn hann langaði bóltin flatt í netið til 2-0. Og løtu seinni stóð 3-0, eftir at útlúgvaður Torkil Nielsen vann eitt heldur heppið brotsspark, sum Tór-Ingar setti trygt í kassan.

Rómurin á heimaáskoðarunum var øgiligur, og rópini út á vøllin vóru ikki altíð so vinarliga sinnað móti gestunum, sum nú bæði umsitingarliga, fyrireikingarliga og ítróttarliga høvdu spælt fallitt.

## Kæra seg sjálvar?

Fallitt er kanska dekan ov nógv sagt, tí sjálvandi hevur MB enn møguleikan, alla ta tíð at enn er ein returdystur eftir at spæla. Tað tykist tó heldur margháttligt, at besti møguleikin, sum MB hevur at vinna samlaðu uppgerðina, nú er, um teir kæra seg sjálvar fyri nýtslu av ólógligum leikarum. Tað kundi viðført eitt tap upp á 0-0, og so høvdu møguleikarnir hjá einum kanska lógligum MB verið størri leygardagin, enn teir annars eru.

At MB má kæra seg sjálvt, kemst helst av, at sandavágsmenn neyvan gera tað. Teir hava vunnið dystin við ítróttarligu fortreytunum á rætta stað, og so sleppa teir undan at gerast partur í hesum stríðsmálinum. Annar møguleiki er so eisini, at FSF sjálvt tekur málið til viðgerðar. Sum tað framgongur aðra staðni á síðuni, so er tann møguleikin als ikki so fjarður, og so er spurningurin, hvat úrslitið verður.

## SÍF-MB 3-0 (1-0)

1-0: John Thomsen
2-0: Rúni Olsen
3-0: Tór-Ingar Akselsen (br.)

**Dómari:** Dagfinn Olsen: Tóktist í fleiri førum ikki hava tamarhald á illstøðunum, sum íkomu á vøllinum.